# Náttúrubarnagarðurin Sóljuhjarta, Søldarfjørður

Í Sóljuhjarta ganga 80 barnagarðsbørn og 26 vøggustovubørn. Barnagarðsbørnini halda til í Sóljuhjarta og vøggustovubørnini í Søldarfjarðar skúla.

**Lýst verður eftir:**
Námsfrøðingum á 30 tímar viku Talan er um tíðaravmarkað starv í barnagarðstovu fram til 9 juli 2021 Byrjað verður í starvinum týsdagin 15 nov. 2020 ella eftir nærri avtalu.

**Vit ynskja:**
• At tú hevur hug og áræði at skapa ein fjøllbroytta og tryggan gerandisdag, við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum
• at tú ert íðin, nærlagdur og álítandi
• at tú dugir væl at samskifta og hevur góð samstarvsevnir
• at tú ert nýhugsandi, ígongdsetandi og megnar broytingar um so skuldi verið
• at tú sær møguleikar í náttúruni og gert brúk av teimum í arbeiðinum
• at tú ert við til at mynda og menna okkara námsfrøðiliga umhvørvið

**Lønar og setanartreytir**
Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya. Námsfrøðingar verða løntir á stig 11-22.

Søkir eingin námsfrøðingur, kann hjálparfólk vera sett tíðaravmarkað ístaðin.

**Fleiri upplýsingar**
Nærri fæst at vita um starvið við at tosa við Káru Løkin, leiðara tlf. 297171/667170

**Umsóknir**
Umsókn skal vera kommununi í hendi í seinasta lagi mikudagin 28 okt. 2020

**Runavíkar Kommuna**
Heiðavegur 26
600 Saltangará
runavik@runavik.fo